# IEIMA



## HEIMKOMIN

*Endiliga sluppu tey aftur á føroyska jørð. Her avmyndaði saman við Magna Arge, stjóra í Atlantsflogi, sum eisini var strandaður í Bretlandi.* ***A.f.v:*** *Morten Hust Petersen (leiðari), Ragnvaldur Atlason Jensen, Kristian Martin Garðalið, Laila Weihe (námsfrøðingur) René Líð Thomsen, Ann Poulsen (námsfrøðingur), Dánial Gram Høgnesen og Magni Arge* ***F.f.v:*** *Elin Løkin, Martha Hansen og Tórður Hjalt Jacobsen*







## LÆTTI

*Morten Hust Petersen, leiðari á Rásini, merkti ein stóran lætta á sær, tá flogfarið rullaði út á breytina og nøsin varð vend móti Føroyum*

## Upp á hangandi hár

Mánakvøldið varð Morten Hust Petersen eina ringdur upp úr Føroyum. Tað vóru boð frá Atlantsflogi um, at útlit vóru fyri at eitt flogfar kundi seta seg í Glasgow tíðliga um morgunin.

Nú ráddi um at fáa beinini upp á nakkan og sleppa sær avstað sum skjótast. Tey fingu fatur á tveinum hýruvognum, sum skuldu koyra tey langa teinin úr London til Glasgow - kosta hvat tað kosta vildi.

- Ja, altso um einar 9000 krónur haldi eg, at tað hevur kostað, so sjálvandi var tað nógv, og kundu vit ikki gjalda kontant, so fór tað at verða eyka dýrt. So vit noyddust at taka pengar út og leggja út. Men tað mugu vit bara ordna tá vit koma heim, tað mest umráðandi hjá okkum var at sleppa úr London og heim, tí mann veit ongantíð nær mann fær møguleikan aftur, segði Morten Hust Petersen, tá vit prátaðu við hann umborð á Atlantsflogi á veg til Føroyar.

Tey settu seg í hýruvognarnar í London um midnáttarleitið, og so at koyra upp gjøgnum Bretland til Glasgow.

Tað var eisini upp á eitt hangandi hár, at tey sluppu úr Glasgow til Føroyar í gjár. Loftrúmið yvir Vágum og yvir Glasgow var bert latið upp eina løtu í gjár, tí at nýggj øska var á veg úr Íslandi inn yvir Glasgow.

Men í Føroyum vóru grov kavaæl fyrrapartin í gjár, og gjørdi hetta at Atlantsflog ikki slapp avstað beinanvegin klokkan 10, tá ætlanin var at fara. Og tey vistu, at umleið á middegi fór flogvøllurin í Glasgow at lata aftur.

Klokkan 10.40 slapp RC1414 úr Vágum og setti kósina beint móti Glasgow. Fáar minuttir áðrenn middag var trappan sett inn móti flogfarinum í Glasgow, og farandi gestir vóru hurraðir úr flogfarinum, og so skuldu teir 20 føroyingarnir, sum vóru komnir til Glasgow, fáast umborð sum skjótast.

Lítið meira enn 20 minuttir vóru gingnir, frá tí at flogfarið var tømt fyri ferðandi til Glasgow, so komu ferðafólkini, sum skuldu heimvið umborð á flogfarið, og klárt var at fara avstað aftur.

Hóast klokkan var farin av middegi, áðrenn klárt var at fara, góvu myndugleikarnir í Glasgow Atlantsflogi loyvi at fara avstað, og í hølunum á RC1415 úr Glasgow lat floghavnin aftur.

## So hjartans fegin

Tá tey fyrstu ferðafólkini og næmingarnir á Rásini komu umborð á Atlantsflog í Glasgow, legði tú beinanvegin til merkis, at lagið var ófóra gott á teimum øllum.

Morten Hust Petersen viðgekk eisini, tá vit prátaðu við hann á veg heim til Føroya, at hann kendi ein lætta á sær, tá hann flogfarið rullaði út á flogbreytina.

- Vit koyrdu úr London um midnáttarleitið, og so hoyrdu vit klokkan seks í morgun á BBC, at loftrúmið kanska fór at lata aftur. So tá vit endiliga settu okkum í flogfarið og koyrdu út á flogbreytina, var eg ein lætnaður maður, segði Morten Hust Petersen.

Eisini lagið á næmingunum tóktist gott, og Morten Hust Petersen greiddi frá, at hóast tað allatíðina var ein stór óvissa um, nær tey fór at sleppa heimaftur, hevði lagið á næmingunum verið gott.

- Ja, eg má siga, at vit hava nakar ótrúliga góðar næmingar, og tey hava fingið sum mest burturúr og hildið høvdið høgt. Vit fóru ein lítlan túr til Brighton í gjár á eitt sindur av sightseeing, og tað lætti eisini um lagið á teimum. Men tey eru troytt nú, vit hava koyrt alla náttina, og tað er avmarkað hvussu nógv vit hava sovið. So eg haldi eisini at tey nú gleða seg at koma heim, greiddi Morten Hust Petersen frá.

Hesir dagarnir eftir ferðina fara eisini til at kobla úr eina løtu og at savna nýggja orku. Eisini er familja her heima, sum tey hava verið leingi burturi frá, og sum hava glett seg at fáa tey heimaftur.

Tá Atlantsflog setti seg í Vágum klokkan 14.05 í gjár, var líka tíð sett av til at taka eina felagsmynd, ein skjótur túrur var gjørdur inn í tollfríu búina í Vágum, og so var farið í bussin við kós móti Eysturoynni.

Endiliga vóru tey heima.

*rogvi@sosialurin.fo*

*Myndir: Álvur Haraldsen*

**20 minuttir**

Høvdu strandaðu ferðafólkini í Glasgow at renna í frá tí at trappan varð sett at síðuni á Atlantsflogi, til at tey skuldu vera komin umborð. Kom nøkur sum helst seinking í, varð loftrúmið helst latið aftur, áðrenn tey vóru sloppin á flog.